

Mynd: Shell

# Greinarar: Veitingarfyritøkurnar hava tvey tung ár fyri framman

**Jógvan Hugo Gardar**

13.09.2015 - 23:52

Oljan.fo

Fleiri av teium stóru veitingarfyritøkinum innan oljuvinnuna eru í kreppu, nú oljuprísurin er so lágur. Millum hesar fyrtikøkurnar eru, sambært Dagens Næringsliv, Schlumberger, Conoco-Phillips og Halliburton. Og kreppa kemur at versna og støðan kemur ikki at batna fyrstu tvey árini.

Tað er DNB Markets sum hevur hugt nærri eftir gongdini og útlitunum hjá 33 av teimum størstu veitingarfyritøkunum innan oljuvinnuna. Sambært gerinarunum hjá DNB Markets so

loysir tað seg ikki at umhugsa at keypa partabrøv hja nakrari av teimum 33 fyritøkunum, men 26 av partabrøvunum halda greinararnir at tað er best at selja tey. Sjey av partabrøvunum halda greinararnir at ein eigur at bíða við um ein vil keypa ella selja hesi partabrøvini.